Danir lok á tilfar um føroyska undirgrund

JAN MÜLLER

Samtíðis sum tíðindasendingin hjá Sjónvarpi Føroya, Dagur og Vika heldur fram við sínum arbeiði at avduka loyniligskjøl frá donskum ráðharrastovum um føroysku undirgrundina, verður nú roynt at forða sjónvarpinum at fáa alment innlit í øll skjøl, sum hava júst við føroysku undirgrundina at gera.

Í Degi og Viku hoskvøldið kom fram, at danska embætisverkið hevur lagt lok á nærum alt tilfar, sum kann lýsa tey donsku áhugamálini í føroysku undirgrundini. Tað snýr seg um rúgvusmikið tilfar, ið er gjørt bæði fyri og eftir, at føroyingar yvirtóku hetta málsøkið.

Sjónvarpið kunngjørdi týskvøldið part av innihaldinum í einum notati, sum var uppskot til, hvussu eitt føroyskt danskt oljufelag kundi setast á stovn.

Hetta notatið, sum er frá 19. apríl 1994, er sambært Degi og Viku tað fyrsta ítøkiliga dømið um tey donsku áhugamálini í føroysku undirgrundini.

Har verður skotið upp, at eitt føroyskt-danskt oljufelag skal hava einkarrætt at bora og útvinna olju í 10 til 15 ár, og at donsku feløgini Dong og Dopas skulu umsita felagið og gera arbeiðið.

Eftir hesum skuldi danski staturin leiða føroyingar inn í oljuvinnuna og samtíðis tryggja sær sín part av inntøkum og sita við stýrisvølin vísti Dagur og Vika at siga frá.

Einki løgið men

Sjónvarpið leggur to afturat, at einki løgið er í hesum, at danska stjórnin, sum hevur lænt føroyingum milliardir, vil tryggja sær sín part, um nøkur inntøka verður av eini komandi oljuvinnu.

Spurningurin er bara, um hetta er ein ætlan, ið varð løgd, longu áðrenn føroyingar yvirtóku málsøkið.

Víðari verður sagt, at hesum spurningi ber ikki til at svara greitt í løtuni. Heldur ikki ber til at svara, hvørja ætlan danskir myndugleikar hava gjørt eftir, at teir sleptu uppskotinum um eitt danskt-føroyskt oljufelag.

Sjónvarpið upplýsir, at notatið um eitt danskt-føroyskt oljufelag er í eini serstøðu. Tað er nevniliga eitt av teimum heilt fáu notatunum, sum Sjónvarp Føroya hevur fingið innlit í í donskum ráðharrastovum.

Harafturímóti hevur sjónvarpið fingið eina ørgrynnu av skjalalistum úr donskum ráðharrastovum, sum allir viðgera undirgrundina og donsku áhugamálini. Úr hesum listum kunnu nevnast

„Statens engagement i den færøske råstofudvikling" fra 1994, og „Notat om alternative modeller for et danskst-færøskt samarbejde om tilrettelæggelse om den færøske råstofudvikling" o.s.fr.

Hóast vit fáa innlit í nógv onnur skjøl um nógv onnur mál viðvíkjandi Føroyum, so er støðan greið, tá tað snýr seg um undirgrundina. Her verður innlit noktað úr øllum donskum ráðharrastovnum, varð sagt í Degi og Viku.

Sjónvarpið hevur sent eina kæru til umboðsmannin hjá fólkatinginum um, at forsætismálaráðið hevur sýtt fyri at veita innlit í undirgrundarmálið.

Upplatingartíðir

Mánadag, týsdag og mikudag:
Einans útkoyring út av húsinum
frá kl. 17.00 til kl. 23.00

Hósdag-sunnudag:
Opið sum vanligt

Pizzaria
Tel 18866

FLAKA-MASKINA til sølu

Ein BADER 189, er sum nýggj og hevur eitt ára garanti

Brúkt maskina kann ganga inn í keypið
Má ikki hava verið brúkt umborð á skipi.

SILDAGOYMSLAN
Tlf. 12355 (tlf. 10-15)

FULLTRÚI

Býráðið søkir fulltrúa til miðfyrisitingina. Fulltrúin kemur m.a. at standa fyri eini broyttari og viðkaðari starvsfólka- og lønardeild við tilvísing til býráðsskrivaran. Deildin verður væntandi mannað við 2 fólkum umframt leiðaran.

Nakrar av uppgávunum:
- Lønaravgreiðsla
- Dagføring av starvsfólkareglugerð
- Starvs- og uppgávulýsingar
- Sáttmálaviðurskifti
- Starvsfólkamenning og -røkt
- Kunningartænasta

Nærri lýsing av uppgávunum:

Dagligu uppgávurnar fevna um vanliga **avgreiðslu av lønum** fyri allar stovnar og deildir hjá kommununi og umsiting av frítíðardøgum, sjúkradøgum, frígongu o.a. Kommunan hevur umleið 500 fast- og tímalønt starvsfólk.

Leiðarin skal vera við til at lýsa verandi arbeiðsgongdir á økinum og vera við til at umleggja hesar, soleiðis at tær verða so smidligar og tryggar sum gjørligt. Eisini skal hann vera við til at gera trygdarreglur og at hava eftirlit við, at tær verða fylgdar. Leiðarin skal eisini vera við til at menna EDV-skipanir, m.a. í sambandi við lønarbókhaldið.

Aðrar uppgávur
- Umsiting av tíma- og klokkuskipan
- Uppskot til lýsingar eftir starvsfólki, viðmæla starvssetanir og avgreiða setanarbrøv
- Umsita avloysaraskipan fyri fólk í styttri farloyvi.
- Lærumeistari og vegleiðari hjá næmingum og praktikantum.
- Lønarupplýsingar í sambandi við fíggjarætlanir og nýtslueftirlit
- Hjásitari við sáttmálasamráðingar.
- Hjálpa til við loysn av trætumálum í sambandi við sáttmálar og avtalur
- Starvsváttanir og ummæli av starvsfólkum.

Býráðið er í holt við at tilevna ein miðvísan **starvsfólkapolitikk.** Leiðarin á starvsfólka- og lønardeildini skal, saman við býráðsskrivaranum og deildarleiðarum, verða við í hesum arbeiðinum og í hesum sambandi m.a. taka sær av:

- Samskipan av arbeiðinum við einum starvsfólkapolitikki
- At seta gongd á eina málrættaða eftirútbúgving av starvsfólkum og leiðarum.
- Starvsfólkasamrøðum.
- Kunning um starvsfólkamál
- Vegleiðing og hjálp hjá deildum og stovnum í sambandi við starvsfólkaviðurskifti
- At leggja fram árligar ætlanir og frágreiðingar á starvsfólkaøkinum
- Lýsing av arbeiðsgongdum á deildum og stovnum og koma við hugskotum til møguligar umleggingar.

Býráðið hevur sett sær fyri at víðka **kunningartænastuna** hjá kommununi, bæði uttan- og innanhýsis.

Í hesum sambandi verða uppgávurnar hjá miðfyrisitingini:

- At byggja upp og viðlíkahalda eina innanhýsis kunningarskipan á PC-netinum.
- At byggja upp og viðlíkahalda eina kunningarskipan á Internet til nýtslu hjá borgarum í kommununi og øðrum.
- At standa fyri útgávu av kunningarritum sum t.d. »Tórshavn í tølum« og »Havnarbókin«.

Býráðið kann bjóða:

Eitt áhugavert starv, har høvi m.a. er at mynda starvsfólkapolitikkin hjá býráðnum og við møguleikum fyri persónligan og fakligan menning.

Býráðið roknar við at umsøkjarin:

Er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og hevur samstundis lætt við at samskifta og læra frá sær.

Er hugaður fyri starvsfólkarøkt og yrkisviðurskiftum.

Er førur fyri at lýsa trupulleikar og finna tær bestu loysnirnar.

Hevur kunnleika til Microsoft Windowsforritini Word, Excel og Access og lætt við at seta seg inn í onnur forrit.

Setanarviðurskifti

Starvið er starvsmannastarv og lønt í 28. lønarflokki.

Meira fæst at vita

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens M. Poulse, býráðsskrivara, tlf. 15160.

Umsókn

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og viðmælum, skulu sendast Tórshavnar býráð, Postbox 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 22. apríl 1997.

Tórshavnar býráð

SILDINA á borðið
Minkið um kolesterolið

Liv betur – et sild!
sigа teir mest lærdu

Nú heilar og hálvar spannir
- **Saltsildafløk**
- **Kryddsildafløk**

Seks nýggjar, svenskar síldauppskriftir fylgja við

SILDAGOYMSLAN
Tlf. 12355 (tlf. 10-15)

sosialurin

- *Samrøður*
- *Kjak*
- *lýsingar*
- *ítróttur*
- *ummæli*
- *viðmerkingar*
- *lesarabrøv*
- *o.m.a.*

5 ferðir um vikuna

ROKKJALLARIN

Vit átaka okkum at selja fyri fólk.

Eisini keypa vit deyðsbúgv.

Rokkjallarin · Tlf. 11990 & 83390
Tinghúsvegur 42 · 100 Tórshavn

Opið: mánad.–fríggjad. 13–17.30
leygard.: eftir avtalu